## Tvey met til Bjørk



Um vikiskiftið hava Bjørk Herup Olsen og Rannvá Djurholm ,sum renna fyri Bragdið, luttikið í stórari kapping í Danmark, ið kallast Tårnby Games.

Bjørk sum fyrireikar seg til Oyggjaleikirnar á Rhodos rann 800 m leygardag og 3000 m sunnudagin. Á 800 m teigninum setti hon nýtt føroyskt met við tíðini 2.26,21 min og á 3000 m, teigninum setti hon eisini nýtt føroyskt met við tíðini 10.48 min. Á báðum teigninum vann hon sín aldursbólk. Rannvá rann eisini 800 m leygardagin, hon rann teignin við tíðini 2.34,85 min og bleiv nummar fýra í sínum aldursbólki. Sunnudagin rann hon 1500 m við tíðini 5.18 min og tað rakk til eitt triðja pláss. Rannvá setti persónligt met á báðum teinunum.

## Claus við í málveitslu

Blackpool hitaði leygardagin upp til play-off dystirnar við 6-3 sigri á Swansea. Tað líktist tó ikki alla tíðina einum tryggum sigri til Blackpool, tá seinasta umfarið í ensku league one var á skránni. 35 minuttir fyri leiklok stóð 3-2 til heimaliðið á talvuni, men so kom Blackpool ígongd. Claus Bech Jørgensen var á vøllinum allar 90 minuttirnar, men tað var Andrew Morrel, sum tók yvirskriftirnar, tá hann innan 21 minuttir skeyt reint hat-trick. Seinasta málið skeyt Keigan Parker. Blackpool skal spæla hálvfinalur í play-off dystunum ávikavist 13. og 19. mai, og sigast má, at upptaktin til hesar hevur verið framúr. Eftir eina heldur laka byrjan upp á árið, hevur Blackpool verið flúgvandi seinastu mánaðirnar. Og sigurin á Swansea var sjeyndi sigurin á rað.

EB/Streymur – VB/Sumba 4-2 (1-1):

# Víkarmenn vunnu á VB/Sumba



*Eina løtu lúrda tann heilt stóra sensatiónin. Men seinasta hálva tíman megnaði oddaliðið tó at snara dystinum til egnan fyrimun*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

*EB/Streymur*

*VB/Sumba*

**Sensatiónin lúrdi eina løtu, men víkarmennininir Bárður Olsen og Hans Pauli Samuelsen syrgdu fyri, at felagsliðið úr Sundalagnum basti felagsliðnum úr Suðuroynni**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tey bæði einastu felagsliðini í Formuladeildini brustu saman í Streymnesi í gjár. At tey bæði er sokallað felagslið, ella samansett lið, er eisini so at siga einasti felagsnevnarin fyri EB/Streym og VB/Sumba. Undan dystin lá fyrst nevnda fremst í deildini, meðan hitt lá aftast. Hetta er eisini støðan, nú dysturin er spældur, tí EB/Streymur vann 4-2. Hetta boðar kanska frá einum tryggum sigri, men áskoðararnir til dystin í Streymnesi vita betur, tí so var ikki.

### Líktist stórsigri

Lunnar vórðu annars lagdir fyri einum stórsigri, tá víkarmaðurin Bárður Olsen frá brotsteigarmarkinum setti bóltin flatt út í síðunetið. Tá vóru bara fýra minuttir spældir, og løtuna aftaná fekk EB/Streymur í hópatal av málmøguleikum. John Heri Dam, Gert Hansen, Hans Pauli Samuelsen og Ronnie Samuelsen áttu allir at skora, men gjørdu tað ikki.

Tað gjørdi Birgir Jørgensen harafturímóti, tá hann fekk kjansin stutt fyri hálvleik. Hornaspark varð sent innfyri og sterki áleyparin fekk økslina á skotið, og beindi soleiðis bóltin í netið.

Útjavnandi málið skelkaði bæði áskoðarar og leikarar. Ikki tí, EB/Streymur hevði á ongan hátt verið sannførandi hesar fyrstu 40 minuttirnar, men teir høvdu svomið í kjansum og spilt teir ferð eftir ferð.

### Tóku øll á bóli

Málið frá Birgir Jørgensen átti at fingið heimaliðið at ikki. Tvørturímóti var tað VB/Sumba sum kom best frá byrjan í seinna hálvleiki, tá Aco Pandurovic setti eitt brotsspark í netið, sum Egil á Bø hevði framt móti Birgir Jørgensen.

Málið tók alt og øll á bóli, kanska einamest VB/Sumba, sum ikki plagar at vera liðið, ið liggur omaná í einum dysti. Tað gekk tó ikki meiri enn eitt korter, so var leiðslan javnað út aftur. Og so gekk heldur ikki meiri enn eitt korter aftrat, so var EB/Streymur á odda 4-2.

Fyrst javnaði Hans Pauli Samuelsen við frálíkum frísparksmálið upp um múrin. Síðani økti sami maður, tá hann avsluttaði álop, hann sjálvur hevði byrjað í vinstra borði og skallaði returin í netið, eftir at Rafal Kwiecinski hevði buldrað bóltin á tvørtræið.

Soleiðis skoraði víkarmaðurin tvey mál, áðrenn ein annar víkarmaður, Bárður Olsen, skeyt sítt næsta mál í dystinum eitt lítið korter fyri leiklok. Bólturin varð fluttur niðan í vinstra borði, vinstri bakkurin Símun Eliasen leggur inn í brotsteigin, har høgri bakkurin Gert Hansen stendur við handaru stong og stútar bóltin aftur til Bárð Olsen, sum fluktar bóltin flott í kassan.

### Byrjaðu, vendu og endaðu dystin

Hóast sensatiónin eina løtu lúrdi í Streymnesi, so ber illa til at siga annað enn, at sigurin til sundalagsmenn var uppiborin. Uppgávan gjørdist kanska meiri møtumikil, enn EB/Streymur hevði roknað við, og helst hevur hetta eisini havt ein avgerandi týdning, at heimaliðið hevði undirmett mótstøðulið sítt.

Men tá er gott at eiga góðar menn, sum kunnu skapa nakað sjálvir og eisini virka framúr í einum vælkoyrandi kollektivi. Tveir slíkar eigur EB/Streymur í Vík. Bárður Olsen úr Vík setti hol á, men so kom EB/Streymur afturum. Hans Pauli Samuelsen vendi dystinum við tveimum málum, áðrenn Bárður Olsen at enda staðfesti sigurin.

### – Hetta var strævið

Hans Pauli Samuelsen skoraði útjavnandi málið og legði EB/Streym móti VB/Sumba, eftir at felagsliðið úr Sundalagnum hevði verið aftanfyri við einum máli. Ein strævin dystur, heldur víkarmaðurin.

– Hetta var ein strævin dystur. Vit skora ikki upp á møguleikarnar, gerast frustreraðir og so bleiv tað strævið. Og uttan at taka nakað frá VB/Sumba, so kunnu vit bara takka okkum sjálvum fyri, at tað gjørdist so møðsamt, sigur Hans Pauli Samuelsen.

Hann greiðir frá, at tað var soleiðis líka til útjavnandi málið kom.

– Málið til 2-2 var forloysandi fyri okkum, tí eftir tað fóru vit at spæla fótbólt, og allir komu líkasum undan aftur, eftir at einki hevði riggað hjá okkum, sigur Hans Pauli Samuelsen.

### – Ikki uppiborið

– Nei, eg haldi ikki tað er uppiborið, at teir vinna, tá vit føra væl inn í seinna hálvleik. Tað sigur Birgir Jørgensen, sum skoraði fyrsta málið hjá VB/Sumba í gjár.

Sterki áleyparin metir grundina fyri mista sigurin vera, at miðvøllurin ikki heldur seg til, sum frammanundan var avrátt.

– Vit vita, at EB/Streymur hevur ein sterkan miðvøll, og tí fara vit og pressa teir. Hetta megna vit eisini tann fyrsta tíman, men so sleppa vit trýstinum og so eru teir við aftur. Tað, sum EB/Streymur fær í dystinum, er tað, vit geva teimum, sigur Birgir Jørgensen avgjørdur og vísir so á saknin í Evrard Ble.

– Her hevði Ble verið "nydeligur" at havt á miðvøllinum, ein sterkan miðvallarleikara, sum dugir at halda uppá bóltin.

Annars hevur Birgir Jørgensen ikki nógv gott at bera avrikinum frá dagsins dómara, sum hann metir átti at víst bæði Egil á Bø og Ronnie Samuelsen av vøllinum.